# FCK hevur knívin á barkanum

**Einki annað enn samantaldur sigur verður góðkendur, tá ið Todi Jónsson og liðfelagarnir í kvøld og um eina viku fara at royna seg í Europa Cup**

ÚTISETAFELAG Í ALTJÓÐA STRÍÐI
*Jóannes Hansen*



*FCK fær eina trupla uppgávu, tá ið teir á útivølli skulu royna seg ímóti slovenska Nova Gorica í Champions League-undankappingini*

Fyrrapartin í gjár lætti FCK ferðalagið úr Kastrup. Kósin var móti Venedig í Italia. Haðani varð koyrt í bussi í einar tveir tímar. Leiðin lá um markið til Slovenia og til Nova Gorica, har FCK í kvøld skal spæla fyrra dystin í øðrum innleiðandi umfarinum í europeisku kappingini fyri meistaralið.

Í fyrsta umfarinum, sum FCK slapp undan at luttaka í, var tað eingin trupulleiki hjá NK Gorica at varpa estlendska meistaraliðið Flora Tallinn úr kappingini.

Í FCK hópinum eru átjan spælarar. Todi Jónsson og hinir fimtan, sum vóru við í Silkeborg leygardagin, hava fingið nýggjan møguleika, hóast tað ikki hilnaðist nakað serligt í fyrsta landskappingardystinum. Harafturat eru tveir aðrir royndir spælarar í ferðalagnum. Teir eru miðvallarin Carsten Fredgaard, sum síðsta kappingarár var leigaður út til FC Nordsjælland, og álopsspælarin Peter Møller, sum ikki var við í Silkeborg, tí FCK venjarin, Hans Backe, heldur vildi hava Toda Jónsson á beinkinum.

### Trýstið

FCK spælararnir vita væl, at tað avgjørt verður roknað við, at teir skulu megna at vinna á NK Gorica og harvið spæla seg víðari í triðja innleiðandi umfarið í kappingini, har tað fer at verða kappast um, hvørji feløg skulu eiga rættin til saman við teimum størstu í Europa at kappast í bólkaumfarinum í meistarakappingini.

Tað er ikki alt avgerandi, at FCK vinnur í kvøld. Tað, sum hevur týdning, er, at FCK er samantaldur vinnari, tá ið teir týskvøldið í næstu viku hava spælt á heimavøllinum í Parkini ímóti slovenska liðnum. Fyri samantalda úrslitið hevur tað sjálvandi týdning at røkka góðum úrsliti í kvøld, og tað hevur ikki minst týdning at hava tungu útivallarmálini við til hús aftur.

### Fyrireikingin

FCK spælararnir kenna ikki so nógv til mótstøðuliðið. Men venjarin hjá teimum, Hans Backe, hevur verið í Slovenia og sneytað. Svenski venjarin fer gjølla um í fyrireikingunum, og hann hevur gjørt nógv fyri at hansara spælarar ikki skulu undirmeta mótstøðumenninar. Tað vil siga, at hann vil hava sínar menn at sýna heilt øðrvísi hugburð, enn hann heldur, at teir sýndu í Silkeborg leygardagin.

Hans Backe sigur mótstøðuliðið vera mannað við ungum spælarum, sum eru skjótir, og sum eru vandamiklir í deyðbóltsstøðum.

FCK liðformaðurin, Bo Svensson, ásannar, at tað er trýst á teimum at vinna ímóti NK Gorica, og at tað fer at verða mett einki minni enn ein skandala, um FCK ikki fer at megna at spæla seg í triðja innleiðandi umfarið. Men liðformaðurin heldur einki undarligt vera í hesum. Hann vísir á, at FCK eftir donskum umstøðum er eitt tað størsta felagið, og at spælararnir eru keyptir til felagið, tí tað verður roknað við, at teir skulu megna tílíkar uppgávur sum hesa fyri lønina, sum teir fáa.

Tað verður ikki fyrrenn stutt undan fyrsta brískslinum, sum verður klokkan 7 í kvøld, at tað verður greitt, hvussu FCK liðið fer at verða mannað. Avrikið hjá FCK í Silkeborg leygardagin longdi neyvan um vegin hjá Toda Jónsson til pláss millum teir fyrstu ellivu. Todi er toppskjútti í Europa Cup hjá FCK, og tað hevði ikki undrað, um hann í kvøld fer at fáa møguleikan undir liðini á Álvaro Santos í FCK álopinum.

Tað fer at bera til at fylgja beinleiðis við úr Nova Gorica á TV5 (fyrrverandi TV Danmark 1) rásini. FCK fer at spæla heimadystin í Parkini mikukvøldið í næstu viku.

# Fram farið undir endaspurtin

**Julian Johnsson og liðfelagarnir vórðu rudduliga settir upp á pláss, tá ið felagið hjá Fróða og Hans Fróða vitjaði á Akranesi**

ÍSLAND
*Jóannes Hansen*

Í fyrsta umfarinum, sum var á skránni 16. mai, vann Fram, sum tá hevði Ion Geolgau á beinkinum, á Víkingi. Síðani er nógv vatn runnið í ánna. Í tíggju teimum næstu umførunum fekk Fram bara eitt stig, teir eru niðastir á støðutalvuni, og tað hevur verið roknað rættuliga sannlíkt, at felagið hjá Fróða Benja-minsen og Hans Fróða Hansen um einar tvær vikur ongan møguleika fór at hava fyri at varðveita plássið í bestu deildini.

Seinnu árini hevur Fram, sum hevur tókst verið í vónleysum støðum, við rimmar endaspurtum syrgt fyri at bjarga sær plássið í Landsbankadeildini. Sunnukvøldið vóru teir á Akranesi, og úrslitið í 12. umfarinum boðaði frá, at nú er Fram farið undir bjargingarroyndina. Hvørki Fróði Benja-minsen ella Hans Fróði Hansen vóru á Fram liðnum, sum vitjaði á Akranesi sunnukvøldið.

Hóast ÍA hevði bóltin væl meiri enn gestirnir í einki serligu líkindunum - nógvur vindur og grovir ælingar - so var tað bara Fram, ið fekk mál. Teir vunnu 4-0, og tað var avgjørt ikki sambært spælbýtinum. ÍA hevði trettan hornaspørk, meðan Fram hevði trý! Men Fram visti, hvat teir vildu. Teir lógu aftarlaga á vølllinum og bíðaði, og tá ið møguleikin fyri snarálopum stóðst, so tóku teir av. Ofta eru marginalirnir smáir. Um tað eitt nú hevði eydnast hjá Juliani Johnsson at fáa mál, so høvdu fyritreytirnar fyri verjukendum spæli ikki verið so góðar hjá Fram. Men skotroyndin hjá Juliani fór dygst framvið málinum.

Rikharður Daðason setti hol á við brotssparki, sum varð dømt, tá ið bólturin rakti hondina á Juliani Johnsson. Støðan í steðginum var 2-0, og longu í 51. minutti var Fram framman fyri 4-0. Fram hevði undan vind í 2. hálvleiki, men teir hildu fram við sama snitti, sum teir høvdu nýtt í 1. hálvleiki.

Sjálvandi kann tað hugsast, at teir í ÍA hava havt UEFA Cup uppgávuna hósdagin ov frammarlaga í huganum. Men í Íslandi verður sagt, at alt bendir á, at heilt annað lag er komið á Fram, síðani fyrrverandi hjálparvenjarin hjá AGF, Ólafur Kristjansson, hevur fingið ábyrgdina av Fram.

Fram er framvegis aftast. Men nú eru teir við tíggju stigum bara eitt stig aftan fyri Grindavík, sum í gjárkvøldið skuldi spæla í Reykjavík ímóti Fylkir.

Hjá meistaraliðnum KR hevur tað leingi ikki hilnast væl. Undan útidystinum sunnukvøldið ímóti Víkingi høvdu teir ikki vunnið síðani 21. juni. Hesa ferð vunnu teir 2-1. Sigursmálið fingu teir í yvirtíðini. Við sigrinum tók KR seg fram um ÍA. KR er nummar fýra og KR nummar fimm. Bæði liðini hava seytjan stig.

FH styrkti sunnukvøldið um sína støðu sum oddalið. Teir vunnu 1-0 í Keflavík. Einasta málið skoraðu teir í triðja minutti. Málskjútti var danski Allan Borgvardt. Tað eru seks stig frá KR og fram til FH á fremsta plássinum. Tveir triðingar av kappingini eru lagdir afturum. Í Íslandi verður tað ikki útilokað, at tað skal eydnast KR í seks teimum seinastu umførunum at vinna seg fram á fremsta plássið og harvið endurvinna meistaraheitið, sum teir hava átt tvey tey seinastu árini. Men so skulu teir ikki missa nakað serligt afturat.



*Fróði Benjaminsen var ikki við á liðnum hjá Fram, sum í vikuskiftinum vann sannførandi 4-0 sigur á Julian Johnsson og Akranesi á útivølli.*

Tveir dystir eru eftir at spæla í tólvta umfarin-um. Fylkir og Grindavík skuldu spæla í gjár-kvøldið, og í morgin fer ÍBV á Heimey at taka ímóti KA.

Eftir tólvta umfarið er ein lítil steðgur í íslendsku landskappingini. Trettanda umfarið verður á skránni 8. august.





*Tað varð ikki nøktandi hjá FCK bert at fáa javnleik í fyrsta dystinum í kappingarárinum, sum var á útivølli móti uppflytarunum úr Silkeborg*

# Teir stóru mistu beinanvegin

**FCK megnaði bara javnleik í Silkeborg, og Brøndby fekk einki burturúr, tá ið teir høvdu vitjan av væl upplagda OB**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Tá ið bólturin av álvara fór á rull í Danmark í vikuskiftinum, hilnaðist tað ikki væl hjá teimum báðum, sum í fjør vunnu gull og silvur.

Meistararnir í FCK vitjaðu uppflytararnar í Silkeborg. Úrslitið var 2-2, og soleiðis, sum tað tørnaði út, kundu teir í FCK ikki vera annað enn væl nøgdir við eitt stig. Heimaliðið legði bragdliga fyri, og teir høvdu so mikið nógvar málmøguleikar, at einki forgjørt hevði verið í tí, um teir í steðginum høvdu verið frammanfyri við tveimum ella trimum málum. Men svenski FCK málverjin, Magnus Kihlsted, var væl betri upplagdur, enn liðfelagarnir úti á vølllinum vóru tað.

Einasta málið í fyrra umfarinum fekk FCK. Michael Silberbauer, sum fekk so nógva umrøðu eftir Føroya ferðina, skoraði fyri fyrstu ferð í landskappingardysti fyri FCK.

Eftir steðgin tóktist tað fleiri ferðir sum um, at heimamenninir vóru um at møðast, og at FCK á sama hátt, sum teir so ofta gjørdu síðsta kappingarár, skuldu vinna tepurt. Men Silkeborg javnaði, og hóast Thomas Røll fluktaði til 2-1 til FCK, so megnaði Silkeborg at javna. Í tí førinum var FCK málverjin ikki so heppin.

Todi Jónsson varð settur á vøllin, tá ið tað restaðu 25 minuttir. Hann loysti málskjúttan til 1-0 av. Beinanvegin eftir at Todi var komin á vøllin, javnaði SIF. Tá ið FCK legði seg fram um aftur, átti Todi, sum annars fall væl inn í samanspælið, sín lut. Í sera stórum tronga kring brotsteigarmarkið og mitt fyri lyfti hann snildisliga bóltin upp um verjuspælara og til Thomas Røll, sum skoraði.

### Brøndby kiksaði

Lagið á Michael Laudrup var einki serligt sunnukvøldið. Sunnudagin var rættuligt áarføri á Sjællandi, og tí vóru ikki fleiri enn stívliga fjúrtan túsund á Brøndby stadion, har OB vísti, at teir avgjørt ætla sær at vera við, har tað altíð er hugaligt at kappast.

OB legði seg tíðliga framum, men dygst undan steðginum javnaði Brøndby. Eftir steðgin var spælið hjá heimaliðnum framvegis ikki serliga hugflogsríkt, meðan mótstøðumenninir vóru vandamiklir so at siga hvørja ferð, tá ið teir fóru í álop. Innskifti Søren Berg stútaði OB framum 2-1.

Esbjerg, sum síðsta kappingarár endaði á bronsuplássinum, spældi ikki í vikuskiftinum. Tað komst av, at Esbjerg leygardagin var upptikið av Intertoto Cup kappingini, har teir nú skulu royna seg ímóti Schalke 04. Dysturin hjá Esbjerg ímóti uppflytarunum úr Randers FC varð útsettur.

AaB og FC Midtjylland vóru í fjør við í kappingini um fjórða plássið. Sunnudagin hittust hesi bæði feløgini í Aalborg, har egyptiski álopsmaðurin hjá FCM, Mohammed Zidan, staðfesti, at teir í hansara felag kunnu fegnast um, at milliónirnar, sum teir ivaleyst fara at fáa fyri at selja hann, ikki enn eru komnar í kassan.

FCM vann 2-1, og Zidan var sera væl upplagdur. Hann skoraði bæði FCM málini. Serliga tað fyrra var framúr. Í høgru og einar 25 metrar úr málinum, snaraði hann um seg sjálvan, áðrenn hann við vinstra fóti smekkaði dygst undir handaru samankomingina.

### AGF fótaði sær

Í Farum hevði FCN vitjan av AGF. Heimaliðið legði bragdliga fyri. Tá ið eitt korter var farið, vóru teir frammanfyri 2-0, og alt bendi á, at AGF enn eina ferð skuldi fáa ein ordu-ligan lúsing, og at teir í Århus enn eina ferð skuldu hava leiklutin sum botnproppur.

Men AGF fótaði sær. Undan steðginum skoraðu teir tvey mál, og eftir steðgin kom einki mál.

Í Herfølge hava teir skift tað mesta av fólkinum út. Í fyrstu royndini var tað ikki verri enn ilt, at teir megnaðu málleysan javnleik ímóti Viborg. Báðir partar høvdu fleiri málmøguleikar.

Næsta umfarið er á skránni leygardagin. Leygardagin verður FCM-OB á skránni, og sunnudagin er skráin henda: Brøndby-Viborg, Randers-Herfølge, Silkeborg-AGF, AaB-FCN og FCK-Esbjerg.

# Føroysk mál í síðstu royndini

**Í Fremad Amager verður støðan hildin at vera hampuliga góð undan fyrstu royndini í landskappingini, sum verður næsta vikuskifti**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Í vikuskiftinum løgdu flestu feløgini í næstbestu deildini í Danmark síðstu hondina á fyrireikingarnar til fyrsta umfarið, sum verður næsta vikuskiftið.

Fremad Amager var í Hvidovr, har teir vunnu 3-1 á heimaliðnum, sum nú er í 2. deild. Allir tríggir føroyingarnir vóru í ferðalagnum. Hjalgrím Elttør og Andrew av Fløtum vóru millm teir fyrstu ellivu. Teir vórðu saman við fleiri øðrum skiftir út í 68. minutti. Millum teir, sum tá komu á vøllin, var Jann Ingi Petersen.

Hjalgrím Elttør skoraði til 2-0 í 40. minutti, og Jann Ingi Petersen syrgdi tveir minuttir eftir, at hann var komin á vøllin fyri 3-1 málinum. Fremad Amager venjarin sigur seg vera væl nøgdan við avrikið. Hann hevur átjan spælarar, sum kappast um plássini á liðnum.

Frem hevur tveir føroyingar í hópinum. Gunnar Nielsen, sum er eykamálverji, og Jón Rói Jacobsen, sum tykist hava vunnið sær fast pláss í miðverjuni. Í vikuskiftinum spældi Frem á heimavølli ímóti Næstved, sum spælir í 2. deild. Úrslitið varð 2-2.

Enn fer at ganga rúm tíð, áðrenn Christian Høgni Jacobsen verður førur fyri at spæla aftur. Felagið hjá honum hevði einki serliga síðstu roynd, áðrenn teir skulu í eldin í landskappingini. Vejle var í Odense og spældi ímóti B1913, sum síðsta kappingarár flutti niður í 2. deild. Heimaliðið vann 4-1. Málið hjá Vejle stútaði Ulrik Balling, sum fyri tveimum árum síðani kom til Føroya undan Ólavsøkuni at hjálpa NSÍ í steypafinaluni.

Ivaleyst eru tað onkrir føroyskir ferðamenn í Danmark, sum kundu hugsað sær at sæð onkrar dystr, nú teir kortini eru á flatlondum. Tey, sum eru stødd í Keypmannahavn hava fleiri møguleikar at síggja útisetar spæla í vikuskiftinum.

Fremad Amager skal í eldin í landskappingini leygardagin, tá ið teir skulu spæla á Eysturbrúgv í Keypmannahavn ímóti Skjold. Frem skal sunnudagin spæla á heimavøllinum í Valby parkini ímóti Dalum. Eitt sindur uttanfyri sjálvan høvuðsstaðin skal Horsens, sum hevur Johan B. Hansen í hópinum, spæla ímóti Ølstykke sunnudagin, og sama dag skap Vejle spæla í Næstved.



*Jann Ingi Petersen skoraði fyri Fremad Amager í seinastu roydini undan kappingarbyrjan*